# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 3. februar 2010


# Langt millum ynski-dreym og marru

**Sunnudagin verður lutur kastaður um, hvussu spælast skal til komandi EM-undankappingina í fótbólti. Og eingin ivi er um, at spenningurin í fótbóltssambandinum er øgiligur, nú londini skulu dragast úr pottinum**




Jákup Mørk

Tað er nevnliga stórur munur á útlitunum fyri pengakassan í FSF, um mótstøðuliðini úr ovasta styrkisbólki eita eitt nú Ongland ella Russland.

Sama søgan er galdandi fyri í øllum førum teir tríggjar ovastu styrkisbólkarnar, har lond sum Ongland, Danmark og kanska Írland kunnu roknast við at fylla Tórsvøll ella Svangaskarð.

Hinvegin er spurningurinn, um Russland, Rumenia og Bosnia-Herzegovina kunnu fylla Gundadal, sum jú eisini kann nýtast, um FSF ynskir at gera sær dælt av altjóða góðkenningini, sum bæði undirlag og stadion hjá høvuðsstaðarfeløgunum nú hava fingið.

Lutakastið fer soleiðis fram, at níggju bólkar verða dignir. Í seks av hesum eru seks lið, meðan fimm av bólkunum bara telja fimm lið. Hetta fyri at fáa matematisku kabalina at ganga upp.

Lutakastið fer fram í pólverska høvuðsstaðnum, Warszava, sunnudagin klokkan 11 okkara tíð. Fyri FSF eru Høgni í Stórustovu, forseti, Brian Kerr, landsliðsvenjari, Magnus á Stongum, formaður í landsliðsnevndini, og Virgar Hvidbroe, aðalskrivari, við á ferðini.



Seinastu tríggjar undankappingarnar hevur Frakland verið partur av føroyska bólkinum, og hetta er eisini ein møguleiki hesaferð

## FAKTA

### Soleiðis eru liðini styrkismett

**Bólkur 1:** Spania, Týskland, Holland, Italia, England, Kroatia, Portugal, Frakland, Russland
**Bólkur 2:** Grikkaland, Tjekkia, Svøríki, Sveis, Serbia, Turkaland, Danmark, Slovakia, Romenia
**Bólkur 3:** Ísrael, Bulgaria, Finland, Noreg, Írland, Skotland, Norður Írland, Eysturríki, Bosnia-Herzegovina
**Bólkur 4:** Slovenia, Letland, Ungarn, Litava, Hvítarussland, Belgia, Wales, Makedonia, Kypros
**Bólkur 5:** Montenegro, Albania, Estland, Georgia, Moldova, Ísland, Armenia, Kazakhstan, Liechtenstein
**Bólkur 6:** Azerbaijan, Luxembourg, Malta, Føroyar, Andorra, San Marino

# Tvær vikur til uppstillingina

**Mikukvøldið 17. februar er seinasta freist at skjóta upp nøvn til nevndar- og forsetaval í Fótbóltssambandinum**




Jákup Mørk

Tað hevur verið lítið at hoyrt frá føroysku fótbóltsfeløgunum, síðani tey á fundi í november mánaði søgdu FSF-nevndini, hvar skápið skuldi standa í mest sum endaleysu trætuni, sum stóð í ljósum loga í málinum um aðalskrivaran.

Tað málið endaði fyribils við, at aðalskrivarin og FSF gjørdu eina fráfaringaravtalu, men samstundis ljóðaði í krókunum, at fleiri broytingar helst vóru í væntu á aðalfundinum.

Hesin verður hildin tann 27. februar, men tað einasta, sum enn stendur greitt, er, at nýtt andlit skal veljast fyri Svein Tróndarson, sum hevur boðað frá, at hann ikki stillar uppaftur.

Magnus á Stongum, Rúni Heinesen og Høgni í Stórustovu standa eisini fyri vali á aðalfundinum. Í mun til gomlu reglugerðina, so er tað nú soleiðis, at teir ikki uttan víðari kunnu boða frá, at teir taka við afturvali, men skulu teir aktivt fáa felag ella feløg at skjóta seg upp til ávíkavist nevndar- og forsetavalið.

Og hetta skal altso gerast í seinasta lagið annan mikudag. Reglurnar siga, at freistin fyri at seta fram uppskot til nevndar- og forsetaval, er 10 dagar undan aðalfundinum.

# Hull argaði Chelsea

**Chelsea hevði í gjárkvøldi møguleikan at leggja fýra stig millum seg og Manchester United, men hetta miseydnaðist**




Jákup Mørk

Undan dystinum var Chelsea eitt stig framman fyri verjandi meistararnar, og teir áttu ein dyst til góðar.

Hesin gav tó ikki ætlaða sigurin, hóast Chelsea hevði greiða yvirvág og nógvar royndir móti málinum.

Hull legði seg á odda á hálva tímanum, tá Steven Mouyokolo stútaði hornaspark í netið.

Undan steðginum javnaði Didier Drogba, sum spældi sín fyrsta dyst fyri Chelsea eftir nú lidna African Nations.

Chelsea kundi og skuldi kanska eisini skorað avgerandi málið eftir steðgin, men hóast royndirnar vóru nógvar, so eydnaðist hetta ikki.

Eisini skuldu West Ham og Wolverhampton spæla í gjárkøldið, men tann dysturin varð útsettur vegna veður.